Fra: Jóhanna Arge <johannaa@logting.fo>
Dato: 30. november 2020 kl. 17.07.00 WET
Til: Bárður á Steig Nielsen <bsn@tinganes.fo>
Cc: Marjun Hanusardóttir <marjunh@tinganes.fo>, "Christian F. Andreasen" <cfa@jura.fo>
Emne: Áheitan frá Rættarnevndini í sambandi við løgtingsmál nr. 42/2020

Til Bárð á Steig Nielsen, løgmann

Rættarnevndin hevur á fundi í dag umrøtt løgtingsmál nr. 42/2020 Uppskot til løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin).

Undir orðaskiftinum við 1. viðgerð av uppskotinum varð orðingin av § 98, stk. 1 umrødd. Serliga snúði orðaskiftið seg um, hvussu orðini "við útlendskari hjálp" og "loysa" skulu skiljast í tí samanhangi, sum ásetingin snýr seg um.

Rættarnevndin umhugsar at at skjóta upp at broyta ásetingina í § 98, stk. 1 til tess at gera tað greiðari, hvat ásetingin fevnir um.

Greitt er, at stórt varsemi skal vísast við at gera broytingar í revsilógini, um hesar ikki skulu hava ótilætlaðar avleiðingar á aðrar ásetingar í lógini. Í ítøkiliga førinum verður hædd eisini at taka fyri, hvørja ávirkan ein tílík broyting kann hava á § 110 g í uppskotinum, sum snýr seg um at fremja tær í § 98, stk. 1 nevndu gerðir ímóti danska statinum.

Tískil loyvir Rættarnevndin sær at heita á løgmann, sum umsitur málsøkið og hevur neyðuga fakkunnleikan og eisini varðar av broytta uppskotinum, skuldi broytingaruppskotið verið samtykt, um at orða eitt broytingaruppskot til § 98, stk. 1, ið leggur upp fyri teimum ivamálum, sum vórðu umrødd undir orðaskiftinum við 1. viðgerð.

Vinaliga
Vegna formannin í Rættarnevndini

Jóhanna Arge
Løgfrøðingur / Nevndarskrivari

<image001.gif>

tel. +298 363907
johannaa@logting.fo • logting@logting.fo • www.logting.fo